# Eigur ikki at henda

Tað, sum hendi umborð á føroyska trolaranum Herkules, eigur ikki at henda umborð á einum grønlendskum trolara. Tað sigur Hans Fleischer hjá grønlendska sjóferðslustýrinum. Hann vísir á, at grønlendsku trolararnir hava ikki tey ljósrørini, sum Herkules hevði, og harafturat eru eingir máltrupulleikar umborð á grønlendskum skipum. Hans Fleischer sigur, at tey grønlendsku reiðaríini hava fingið frágreiðingina um vanlukkuna við Herkules.



*Ein vanlukka sum tann umborð á Herkules eigur ikki at henda við grønlendskum trolarum*

*Mynd: KNR*

# Ruddar slóð fyri sjálvstýri

Semjan millum danir og grønlendingar um, hvussu vinningurin av einari møguligari oljuvinnu í Grønlandi skal býtast millum partarnar, er ein góð avtala, sum leggur lunnar undir grønlendskt sjálvstýri. Tað heldur framsøgumaðurin hjá teimum konservativu Danmark, Per Ørum Jørgensen. Hann sigur við KNR, at við avtaluni verður Grønland ikki so bundið av búskaparligum stuðuli úr Danmark og harvið meiri sjálvstøðugt, sigur hann.

# la hálvbróðurin



inum til løgregluna, og 23. august 2006 fór løgreglan alment undir kanningararbeiðið í hesum málinum.

Eisini mamman at teimum báðum systkinabørnunum hjá forórættaða, og sum ákærdi sambært ákæruritinum eisini hevði gjørt seg inn á, vitnaði í rættinum. Í einari kenslubornari vitnisfrágreiðing segði hon, at hon ongantíð hevði væntað nakað slíkt frá ákærda, og at hon hevði ógvuliga ilt við at trúgva, at nakað slíkt kundi vera farið fram.

Beinleiðis spurd av verjanum, Christiani Andreasen, viðgekk hon, at hon trúði, at málið kundi verið sett í gongd sum ein hevnisøka frá mammu hins forórættaða, fyri at hevna seg inn á fyrrverandi mannin, sum er bróður til mammu at systkinabørnunum.

Men eisini hon valdi at trúgva sínum egnu børnum, tá hon seinni spurdi tey um, hvat var hent. Somuleiðis segði hon, at hendingarnar hava ávirkað børnini ógvuliga nógv, og at tey framvegis ræðast ákærda.

## Skaða pápan

Hin ákærdi var ikki til staðar í rættarhølunum. Tað er heldur ikki lógarkravt sambært útsagnum frá verja eins væl og ákæra. Kortini tóktist júst hetta geva teimum trimum landsrættardómarunum trupulleikar, tí hóast rætturin skuldi setast klokkan níggju á morgni, so var klokkan útvíð tíggju, áðrenn rættarfundurin endiliga byrjaði.

Av tí at ákærdi ikki var til staðar, kundi hann heldur ikki avhoyrast, og tí varð frágreiðing hansara í Føroya Rætti lisin upp.

Hann noktar seg sekan. Hann førdi í Føroya Rætti fram, at hann ikki skilir, hví yngri hálvbóðurin setti fram slíkar ákærur, og hann róði fram undir, at tað var mamman, ið hevði lagt hálvbróðrinum orð í munnin, fyri á tann hátt at hevna seg inn á pápan.

Hann greiddi somuleiðis frá, at hann var vitandi um, at pápin hevði havt ónærisligt kynsligt samband við elstu hálvsystur sína.

Eisini skuldsetingunum frá báðum systkinabørnunum vísti hann aftur. Hann segði seg ongantíð hava havt nakað serligt samband við systkinabørnini, hóast mamman at hesum vitnaði, at tey búðu í sama húsi í fleiri ár.

Eftir at vitnisfrágreiðingin hjá ákærda var lisin upp, var tíðin komin hjá ákæruvaldinum at lesa ákæruritið upp. Og ákærurnar vóru ikki fyri sart oyru, sum abbi tann órættaða mátti sanna undir rættarfrágreiðingini hjá Hannu Vang, áðrenn dómurin varð kunngjørdur.

## Ræðuleikar móti børnum

Ákæruritið var í fimm »forholdum«. Tey trý fyrstu snúðu seg um misbrot móti hálvbróðrinum, hitt fjórða móti sjey ára gomlu gentuni og hitt fimta móti níggju ára gamla dreinginum.

Í forholdi eitt verður sagt, at órættaði við tvingsli og harðskapi hevur verið noyddur at nøkta ákærda við. at hesin helt fast í hondini á órættaða, meðan hann noyddi hann at halda um kynslim sín og nøkta sær sjálvum. Eftir hetta royndi ákærdi at nøkta hálvbróðrinum.

Í einum øðrum føri hevði órættaði verið noyddur at nøkta ákærda í eini spæliborg, sum órættaði hevði standandi inni í kamari sínum.

Í øðrum forholdi ljóðaði ákæran upp á oralsex. Hin ákærdi royndi við makt at fáa órættaða at nøkta sær við at taka sín kynslim í munnin. Tað vildi hin órættaði ikki, so ákærdi trýsti á nakkan og høvdið á honum niður móti kynslimi sínum. Tað er eitt sindur ógreitt, um hetta eydnaðist, so sum ákærdi ynskti.

Forhold trý var kortini tað nógv mest álvarsliga og ógvusliga av øllum ákærunum. Sambært vitnisfrágreiðingini frá órættaða hevði ákærdi biðið hann farið innar á WC at vaska sær, men tá órættaði fór, kom ákærdi aftaná og læsti hurðina. Síðani varð órættaði biðin um at lata seg úr klæðunum, og so framdi ákærdi fullbyrjaða neyðtøku móti órættaða. Hetta fór fram í baðikarinum, og aftaná vildi ákærdi hava órættaða at gera tað sama við seg. Hvussu hetta eydnaðist, er somuleiðis eitt sindur óvist.

Forhold fýra snýr seg um eina ákæru um, at ákærdi við eina fermingarveitslu biður sjey ára gomlu gentuna koma innar í eitt kamar, har hann biður hana leggja seg á seingina. Síðani nemur hann við kynslutirnar hjá gentuni, antin uttaná trussunum ella innanfyri.

Seinasta ákæran, forhold fimm, snýr seg um, at ákærdi, meðan hann og órættaði spæla videospæl, setur hann á knæ sítt og heldur honum føstum við aðrari hondini, meðan hann følir innanvert í buksunum upp á níggju ára gamla dreingin.

## Stríð um paragraffir

Ákærin, Hanna Vang, endaði sína rættarfrágreiðing við at krevja ikki minni enn 18 mánaðir treytaleysa fongsling, men helst á leið tvey ár. Samstundis kravdi hon 75.000 krónur í endurgjaldi til hálvbróðurin og tað, sum var vanligt í slíkum málum til bæði systkinabørnini – uttan at nevna nakra ávísa upphædd.

Verjin, Christian Andreasen, undraðist á, at ákæruvaldið nú kravdi hálvtannað til tvey ára treytaleysa fongsulsrevsing, tá kravið í Føroya Rætti var eitt ára treytaða revsing.

Hann førdi somuleiðis fram, at ákærdi í aðrar mátar hevði uppført seg fyrimyndarliga, og vísti á, at hóast truplan uppvøkstur, hevði ákærdi altíð verið væluppdrigin.

Eisini segði Christian Andreasen, at málið í nógvar mátar var serligt, tí líknandi ákærur høvdu verið førdar fram móti pápa ákærda, og havandi í huga hvussu lætt ávirkilig børn eru, kundi júst hetta hava ávirkað órættaða hálvbróðurin.

Somuleiðis metti verjin ikki at § 216, sum snýr seg um tvang og harðskap, kundi nýtast í nevndu førum. Hann endaði tí við at mæla til frídøming ella í øðrum lagi staðfesting av dóminum í Føroya Rætti.

Ákærin, Hanna Vang, hevði annars lagt dent á, at dømt varð eftir §216 um harðskap og tvang, men tá teir tríggir landsrættardómararnir bóðu hana grundgeva nærri fyri at nýta hesa paragraf í tveimum av forholdunum, gav tað ábending um, at teir neyvan vóru nøgdir og ætlaðu at nýta hesa paragraf í nevndu forholdum.

Tá dómurin so fall, var tað forhold trý, sum snúði seg um fullbyrjaða neyðtøku, ið dómararnir løgdu størstan dent á. Her varð ákærdi dømdur eftir §§ 210 (incest), 225 og 222, sum snúgva seg um »anden kønslig omgang end samleje«. Neyðtøkan móti hálvbróðrinum var ikki mett sum samlega.

Í forholdunum eitt og tvey varð ákærdi eisini dømdur, og í forholdi fýra somuleiðis, tó at hann í hesum varð fríkendur í Føroya Rætti.

Í fimta og seinasta forholdi varð ákærdi fríkendur í landsrættinum, eins og hann var í Føroya Rætti.

Dómurin ljóðaði upp á hálvtannað árs treytað fongsul við einari royndartíð upp á tvey ár, umframt sexologiska viðgerð undir kriminalforsorgini.

Hóast dómurin sostatt ikki gjørdist treytaleysur – orsakað av unga aldrinum hjá ákærda – var ákærin væl nøgdur.

- Hetta er ein strangur dómur, og hóast vit høvdu kravt treytaleysa fongsulsrevsing, so er hetta helst tað besta, vit kundu vóna, segði hon eftir dómin við familjurnar hjá órættaðu børnunum.

Ákærdi varð dømdur at rinda hálvbróðrinum 30.000 krónur í endurgjaldi, meðan dómararnir ikki mettu, at systkinabørnini bæði høvdu krav upp á endurgjald.